NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársfrásøgn 2011

## (20. roknskaparár)

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit

INNIHALDSYVIRLIT .......... 2
ALMENNAR UPPLÝSINGAR .......... 3
LEIÐSLUÁTEKNING .......... 4
LEIÐSLUFRÁGREIÐING .......... 5
VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA .......... 6
NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR .......... 7
RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI TÍÐARSKEIÐIÐ 1. JANUAR - 31. DESEMBUR .......... 8
FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBUR .......... 9
GJALDFØRISFRÁGREIÐING PR. 31. DESEMBUR .......... 10
NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN .......... 11

# Almennar upplýsingar

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o TAKS
FO-800 Tvøroyri

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Ingeborg Vinther

**Grannskoðan**

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

# Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri 2011.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við góðan roknskaparsið.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av úrslitinum av virkseminum hjá grunninum.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 25. januar 2012

**Stýrið:**

| | |
|---|---|
| ________________________ | ________________________ |
| Sigurd Poulsen, formaður | Jógvan Vágsheyg, næstformaður |
| ________________________ | ________________________ |
| Gunnvør Dam Jensen | Ingeborg Vinther |

Ársfrágreiðingin er góðkend á stýrisfundi hin / - 2012

____________________

Fundarstjóri

# Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum. Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðar- eftirløn.

Fæ grunnsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 1,75 % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda 1,75 % av útgoldnum A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997.

Við virknað frá 1. juli 2009 er lógin broytt soleiðis, at rætturin til eftirløn er knýttur at, hvussu nógv ár ein persónur hevur búð í Føroyum samanlagt millum 15 og 67 ára aldur. Persónurin kann fáa millum 3/40 og 40/40 av fullari eftirløn úr grunninum.

Við broytingini hevur persónurin rætt til eftirløn, tá hann hevur fylt 67 ár, annahvørt hann býr í Føroyum ella uttanlands.

**Fíggjarlig lýsing**
Í árinum er inngjaldið til grunnin frá løntakarum og arbeiðsgevarum økt við tkr. 6.525. Útgjaldingin til pensjónistar er økt við tkr. 14.866.

Aðrar útreiðslur, avsetingar og tap uppá skuldarar eru tkr. 1.303 størri enn undanfarna ár.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2011 eitt avlop uppá tkr. 41.951 ímóti einum avlopi uppá tkr. 51.595 fyri 2010.

Fíggjarliga nettoinntøkan er minkað við tkr. 20.196 í mun til undanfarna ár, og skyldast hetta í stóran mun ikki staðfest kurstap á partabrøvum.

**Úrslit**
Ársúrslitið í 2011 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 64.566 ímóti einum avlopi uppá tkr. 94.406 fyri 2010.

Eftir hetta verður eginogn grunnsins pr. 31. desember 2011 tkr. 919.095.

**Hendingar eftir roknskaparlok**
Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársfrásøgnini.

**Framtíðin**
Inngjøldini til grunnin væntast at vaksa nakað í 2012 eins og í 2011.

Mánaðarliga upphæddin í arbeiðsmarknaðar eftirløn var í 2011 kr 2.690. Fyri 2012 er útgjaldið sett til kr 2.770 um mánaðin.

Í juli 2009 varð farið yvir til brotútgjald, har eisini føroyingar uttanlands kunnu søkja um at fáa útgoldið arbeiðsmarknaðareftirløn. Hesi viðurskifti hava gjørt, at útgjaldið er størri enn frammanundan.

Búskapargongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan í inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina.

Avkastið av virðisbrøvum verður merkt av, at rentulegan á fíggjarmarknaðum er lág við ársbyrjan. Rentuhækkingar kunnu tí geva vánaligt avkast fyri lánsbrøv. Útlitini eru kanska nakað betri fyri partabrøv, tí at búskaparvøkstur er í pørtum av heiminum. Samanlagt er óvist um avkastið verður verri ella betri enn undanfarna ár.

Samanumtikið verður roknað við einum úrsliti í 2012, sum verður heldur betri enn í 2011.

# Váttan frá óheftum grannskoðara

**Til eigararnar av Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum**

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2011 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymi og notum. Ársroknskapurin er gjørdur í samsvar við góðan roknskaparsið.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2011 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2011 samsvarandi góðan roknskaparsið.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Vit hava lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, hin 25. januar 2012

**NOTA**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| Jørmann Petersen | Bjarni Arnason |
| Løggildur grannskoðari | Løggildur grannskoðari |

# Nýttur roknskaparháttur

**Alment**
Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðan roknskaparsið. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Inntøkur**
Intøka grunnsins – arbeiðseftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75 % av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskrás., umframt reguleringar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari stødd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarkn. eftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75 % av árliga útgoldnu A-inntøkuni.

**Áogn**
Skuldarar eru virðismettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

**Lánsbrøv og partabrøv**
Lánsbrøv og partabrøv eru upptikin til kursvirðið við endan av roknskaparárinum.

**Tíðaravmarkingar, áogn**
Upphæddin umfatar útreiðslur í árinum, sum viðvíkja næsta roknskaparárið.

**Skattur**
Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Rakstrarroknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. desembur

| | Nota | 2011 | *2010* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| Nettoinntøka | 1 | 261.796.782 | *255.272* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -214.553.553 | *-199.688* |
| Aðrar útreiðslur | | -3.494.902 | *-2.991* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar | 2 | -1.797.356 | *-998* |
| | | **41.950.971** | ***51.595*** |
| Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti | 3 | 6.044.711 | *9.377* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap | 4 | -7.943.290 | *11.246* |
| Rentuinntøkur | 5 | 24.513.451 | *22.188* |
| | | **22.614.872** | ***42.811*** |
| **Ársúrslit** | | **64.565.843** | ***94.406*** |
| **Býti av úrsliti:** | | | |
| At flyta til næsta ár | 7 | **64.565.843** | ***94.406*** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desembur

| | Nota | 2011 | *2010* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| ***AKTIV*** | | | |
| Áogn | 6 | 23.760.005 | *26.516* |
| Tíðaravmarking | | 18.806.021 | *17.619* |
| **Áogn íalt** | | **42.566.026** | ***44.135*** |
| Lánsbrøv og partabrøv | | 823.841.908 | *569.697* |
| Tøkur peningur | | 52.970.969 | *241.909* |
| **Íalt** | | **876.812.877** | ***811.606*** |
| **Ogn í umferð í alt** | | ***919.378.903*** | ***855.741*** |
| **AKTIV Í ALT** | | ***919.378.903*** | ***855.741*** |
| ***PASSIV*** | | | |
| **Eginogn** | 7 | **919.094.984** | ***854.529*** |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 170.321 | *164* |
| Onnur skuld | | 113.598 | *1.048* |
| **Skuld í alt** | | **283.919** | ***1.212*** |
| **PASSIV Í ALT** | | ***919.378.903*** | ***855.741*** |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

# Gjaldførisfrágreiðing pr. 31. desembur

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| Ársúrslit | 64.565.843 | *94.406* |
| Broyting avseting tap uppá áogn | 1.600.000 | *0* |
| | 66.165.843 | *94.406* |
| Broytingar í ogn og skuld grunsins: | | |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, arbeiðsgevarar | 740.268 | *-10.228* |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | 415.901 | *372* |
| Tíðaravmarkingar | -1.187.084 | *-1.352* |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | 5.870 | *-83* |
| Onnur skuld | -933.914 | *-561* |
| Gjaldførisúrslit fyri árið | 65.206.884 | *82.554* |
| Gjaldførið pr. 1. januar | 811.605.993 | *729.052* |
| Gjaldførið pr. 31. desember | **876.812.877** | ***811.606*** |

| | | |
|---|---|---|
| **Sundurgreining av gjaldføri:** | | |
| Lánsbrøv og partabrøv | 823.841.908 | *569.697* |
| Tøkur peningur | 52.970.969 | *241.909* |
| | **876.812.877** | ***811.606*** |

# Notur til ársroknskapin

| | 2011 | 2010 |
|---|---:|---:|
| | | *(t.kr.)* |
| **1. Nettoinntøka** | | |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 140.542.176 | *134.647* |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 121.254.606 | *120.626* |
| **Nettoinntøka íalt** | **261.796.782** | ***255.273*** |

*Nettoinntøkan – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75 % av skattskyldugu inntøkuni fyri 2011 sambært fyribilsskattaskrásetingini, umframt reguleringar fyri inngjøld undanfarin ár. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75 % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2011.*

| | 2011 | 2010 |
|---|---:|---:|
| **2. Avsetingar og tap uppá skuldarar** | | |
| Broyting í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | -1.600.000 | *0* |
| Strikað krav, arbeiðsgevarar ið ikki skulu gjalda AM-gjald | 0 | *-749* |
| Avskrivað krav um AM-gjald, arbeiðsgevarar | -183.047 | *-231* |
| Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -14.309 | *-18* |
| **Avsetingar og tap uppá skuldarar íalt** | **-1.797.356** | ***-998*** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---:|---:|
| **3. Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti** | | |
| Vinningsbýti partabrøv | 760.138 | *1.302* |
| Staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 6.037.501 | *5.474* |
| Staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 452.923 | *4.194* |
| Handilskostnaður | -1.205.852 | *-1.593* |
| **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti íalt** | **6.044.710** | ***9.377*** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---:|---:|
| **4. Ikki staðfestur kursvinningur/tap** | | |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | -10.189.030 | *11.109* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 2.245.740 | *136* |
| **Ikki staðfestur kursvinningur/tap íalt** | **-7.943.290** | ***11.245*** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---:|---:|
| **5. Rentuinntøka** | | |
| Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 260.278 | *94* |
| Renta av lánsbrøvum | 22.165.399 | *15.515* |
| Renta av innistandandi | 2.087.774 | *6.579* |
| **Rentuinntøka íalt** | **24.513.451** | ***22.188*** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| **6. Áogn** | | |
| AM-gjald fyri gomul ár, arbeiðsgevarar | 665.547 | *689* |
| AM-gjald fyri roknskaparárið, arbeiðsgevarar | 14.392.572 | *15.109* |
| AM-gjøld løntakarar | 11.701.886 | *12.118* |
| Avsett móti tapi | -3.000.000 | *-1.400* |
| **Áogn íalt** | **23.760.005** | ***26.516*** |

| | | |
|---|---|---|
| **7. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 854.529.141 | *760.123* |
| Ársúrslit | 64.565.843 | *94.406* |
| **Eginogn ultimo** | **919.094.984** | ***854.529*** |

**8. Møguligar aðrar skyldur**

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í ársfrásøgnini.